## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og norði og kavælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum minus 1 og +2 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði og kavæalingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum minus 2 og +1 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum minus 2 og +1 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt kavæalið. Hitalagið millum minus 2 og +2 stig.

# Størsti veiddi hemari í Norðurlondum

**Klokkan 10 í fyrradagin veiddi Johan í bátinum Hoyvík størsta hemaran, ið er veiddur við tráðu í Norðurhøvum**

METFISKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Klokkan var farin av 10, tá Johan Simonsen úr Havn umborð á bátinum Hoyvík veiddi størsta Lamna Nasus – sum hemari eitur á latíni – ið nakrantíð er veiddur í Norðurhøvum.

Vektin var heili 223,5 kg, sum góðkenda vektarstøðin, Sjóðsavni á Argjum, fekk vektina til.

Tá fiskurin var máldur gav hetta 2,24 metrar. Í vekt er hetta bara 6,5 kg frá heimsmetinum.

Hemarin varð veiddur við makreli millum Sveipið og Kirkjubønes.

Jóhan Simonsen hevur, síðan hann var føddur, veitt 16 hemarar við tráðu, og luttekur vanliga í kappingini »Shark Atlantic«, sum Magni Blástein skipar fyri.

Kappingin koyrir frá 1. novembur til 1. mars, og tað eru einir 25 luttakarar.

Í ár hevur Johan Simonsen verið úti og veitt einar 12 ferðir, men hetta er tann fyrsti hemarin, hann hevur fingið í hesum umfari.

Í sjálvari kappingini eru bara tveir aðrir hemarar veiddir, og annan av hesum veiddi Heini Weihe sama dag, sum methemarin varð veiddur.

Hóast Johan Simonsen hevur fingið størsta hemaran í Norðurhøvum nakrantíð, so kennir hann seg ikki tryggan um sigurin.

- Tað er enn long tíð eftir av kappingini, staðfestir ein glaður Johan Simonsen, sum ikki vil kanna sær bitan.



**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -7 |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | -2 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -2 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | 27 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 992 hPa. skamt eystan fyri Føroyar fer suðureftir og dýpist eitt sindur. Eitt hátrýst, 1024 hPa. yvir Eysturgrønlandi viknar.



**Í dag:**
Millum hátrýstið yvir Eysturgrønlandi og lágtrýstið við Skotland rekur køld luft framvegis av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/01 kl. $06^{00}$ – 30/01 $06^{00}$. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° - Mesti hiti máldur í februar: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/02 kl. $06^{00}$ – 02/02 $06^{00}$.
Avfallið higartil í februar: 0 mm

Alt um harmonikur



www.simme.eu




## VESTFALLSKYRRINDI

23. januar – Mánin longst frá jørðini
26. januar – Tendring
2. februar – Fyrra kvarter
7. februar – Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. feb. | 2:24 | 14:53 | 1:24 | 13:53 | 1:39 | 14:08 | 4:24 | 16:53 | 5:24 | 17:53 | 0:39 | 13:08 | - | 12:08 | 2:39 | 15:08 | 3:39 | 16:08 | 2:09 | 14:38 | 3:24 | 15:53 |
| 6. feb. | 3:22 | 15:52 | 2:22 | 14:52 | 2:37 | 15:07 | 5:22 | 17:52 | 6:22 | 18:52 | 1:37 | 14:07 | 0:37 | 13:07 | 3:37 | 16:07 | 4:37 | 17:07 | 3:07 | 15:37 | 4:22 | 16:52 |
| 7. feb. | 4:22 | 16:50 | 3:22 | 15:50 | 3:37 | 16:05 | 6:22 | 18:50 | 7:22 | 19:50 | 2:37 | 15:05 | 1:37 | 14:05 | 4:37 | 17:05 | 5:37 | 18:05 | 4:07 | 16:35 | 5:22 | 17:50 |
| 8. feb. | 5:18 | 17:45 | 4:18 | 16:45 | 4:33 | 17:00 | 7:18 | 19:45 | 8:18 | 20:45 | 3:33 | 16:00 | 2:33 | 15:00 | 5:33 | 18:00 | 6:33 | 19:00 | 5:03 | 17:30 | 6:18 | 18:45 |
| 9. feb. | 6:12 | 18:37 | 5:12 | 17:37 | 5:27 | 17:52 | 8:12 | 20:37 | 9:12 | 21:37 | 4:27 | 16:52 | 3:27 | 15:52 | 6:27 | 18:52 | 7:27 | 19:52 | 5:57 | 18:22 | 7:12 | 19:37 |